## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 11*

### FAKTA

Vindur kann veruliga gerast ein stórur trupulleiki í Stórutjørn, sum eg áður havi ávarað um. Les t.d. hesa belgisku vísindaligu ritgerðina um vindtrupulleikar millum høg hús: "Pedestrian Wind Environment around Buildings", har niðurstøðan er, at tað kann vera beinleiðis vandamikið fyri fótgangarar at ganga millum høg hús á opnu plássum - sjálvt á evropeiska meginlandinum, har tað er nógva ferðir minni vindhart enn í Føroyum! Ritgerðin byggir á 4 konkret dømi og vísir til heilar 206 aðrar vísindaligar ritgerð um aerodynamikk. Ritgerðin kann heintast niður frá hesi internetadressuni: www.kuleuven.be/bwf/common/data/JP_2004_JTEBS_Blocken_1.pdf

Ísland hevur m.a. via heimskendu songkvinnuna Bjørk megnað at marknaðarføra seg væl og at gera Ísland kent úti í heimi fyri sína villu náttúru í sameining við villa náttarlívið í Reykjavík. Nettupp henda sameiningin av mótsetningum – tí frumkenda við tað nútímans – er so eksklusivt og spennandi og dregur fólk úr øllum heiminum til sín – serstakliga kreativ fólk, sum leita eftir inspiratión. Og hygg nú eitt av úrslitunum av hesum arbeiði – pengar flokkast, har kreativitetur, lív og virkni er, og íslendskir pengamenn ekspandera nú sítt virksemi í stórum stíli til londini uttanum.

**Miðbýurin skal vera eitt bankandi hjarta**

Hvussu kanst tú, Jákup, vera við til at geva Havnini teir eginleikar, sum mynda ein livandi BÝ – ein miðdepil og ikki bara ein keðiligan provinsbý? Ítróttar- og frítíðarhentleikar og annað kann saktans liggja í innandura høllum í Hoyvíkshaganum, men skulu íbúðir byggjast har – og skal Stóratjørn gerast til eitt livandi nýtt miðbýarøki, so má eisini byggjast nógv meira miðbýarkent – tvs. lægri (men tó fleirhæddað) og tættari bygningar við fjølbroyttum funktiónum við gøtum á kross og tvørs, so bygningarnir lívga fyri hvørjum øðrum og fyri lívinum á gøtunum.

Hví ikki eisini gera íløgur í verandi miðbýi, so vit fáa ein veruligan BÝ við einum livandi, bankandi hjarta, sum pumpar lív út í restina av landinum og skapar ringar í vatninum langt út um landoddarnar. Eg dugi at síggja óendaligar ótroyttar møguleikar í miðbýarøkinum í Havnini – eitt øki, sum kundi verið brúkt væl annarleiðis og nógv betri enn í dag, soleiðis at har kundi angað bæði av søgu, mentan og av altjóða býi – uttan at man oyðileggur teir kvalitetirnar, sum longu eru har.

Tað hevði veruliga gjørt eitt stórt inntrykk á umheimin, um vit dugdu at gagnnýta tað gamla, vit longu hava, til nakað nýtt, eins og tað verður gjørt nógva aðrastaðni við stórari succes. Havnin hevur so nógvar grundarleggjandi eginleikar, sum kunnu skapa gróðrarbotn fyri einum veruligum livandi miðbýarumhvørvi. Tak nú t.d. hugnaliga havnaumhvørvið í Vágsbotni/Skálatrøð/Bacalao. Har eru gomul pakkhús, sum kunnu brúkast sum mentanarmiðdeplar – til alt møguligt, sum savnar fólk – t.d. konferansuhøli, konserthølir og dansistøð, gallaríir, teatur, internetcaféir, kreativ verkstøð, har innovatørar, vinnulívsfólk, vísindafólk, listafólk, designarar, lýsingarfólk og øll møgulig onnur kunnu arbeiða og inspirera hvønnannan... Vísind, list og vinna í synergiskari sameining. Tað er serliga sovorðin eksklusiv øki, sum gera stórar býir úti í heimi til pulserandi kraftsentur av kreativiteti, innovatión og produktiviteti, og sum dregur enn fleiri fólk, vitan og pengar til sín.

**Ein onnur "Nyhavn" í Vágsbotni**

Hugsa tær Vágsbotn út ímóti Tinganesi sum ein fólkarík Nyhavn við caféum og restauratiónum allan vegin úteftir. Har er fjálgt og veðurgott, og sólargangurin er ideellur. Hugsa tær Skálatrøð ikki bara sum parkeringsøki, men eisini sum eitt hugnaligt torg, við handilshúsum bygd allan vegin upp móti grótveggunum – nýtt, men tó so, at tað fellur náttúrligt inn í umhvørvið annars. Hugsa tær íbúðir á Bacalao-økinum við útsýni yvir keiøkini, sjógvin og bátahavnina - TAð hevði verið ekslusivt og attraktivt fyri tey ressursusterku at keypt! Tey vilja jú búgva so sentralt, sum gjørligt og tætt við, har undirhald og fólkalív er.

Hugsa sær at varðveitt tey gomlu húsini í miðbýnum, sum øll (útlendingar) halda eru so sjarmerandi, og so rivið nøkur av teimum ljótastu cementmonstrunum frá 50'-60'unum mitt í Havn niður og flutt nakrar av teimum funktiónunum, tey hýsa, út úr miðbýnum. Ístaðin kundu vøkur – onkustaðni fleirhæddað – hús verið bygd, sum hóskaðu nógv betur inn í gomlu Havnina, og sum hýstu blandaðum funktiónum, sum skapa lív í miðbýnum – íbúðir, skrivstovur, hotell og handlar hvørt um annað. Húsafasadurnar kundu t.d. verið meira vendar móti sólsíðuni móti vestri, so gongugøtan ikki liggur í skugga, og soleiðis at hiti og ljós verða gagnnýtt mest møguligt.

Helst kunnu havnarfólk og onnur koma við enn fleiri hugskotum, so hetta skal vera ein áheitan til øll, um at spýta síni hugskot í puljuna.

**Brúka pengarnar rætt!**

Góði Jákup á Dul. Um tú vilt brúka hálvaaðru milliard uppá at gera nakað munagott í Føroyum, sum skal geva samfelagnum eitt veruligt lyft og skapa tað ynskiliga kraftsentrið, ið dregur fleiri fólk og ressursur til Føroya – hví so ikki gera íløgur í sovorðið? Hugsa tær, hvussu gott tað hevði verið, um føroyingar endiliga fingu høvi til at liva í einum høvuðstaði við øllum tí, sum eyðkennir ein sannan miðdepil – t.e. einum miðbýi, sum yðjur av fólkalívi og fjølbroyttum vinnuligum, handilsligum og mentanarligum virkni og einum miðbýi, har søga og tradition trívist í fagrari sameining við nútímans lívið við øllum hugsandi tøkniligum hentleikum. Tað hevði veruliga gjørt munin og hevði kunnað givið Havnini eitt brá av tí eksklusiviteti, sum dregur ressursusterk fólk til sín í hópatali uttanífrá.

Eg kann bara krossa fingrar fyri, at tú ert opin fyri at umhugsa eisini aðrar møguleikar fyri íløgur enn bara í ta ætlan, tú hevur lagt fram í fyrstu atløgu – og/ella at ætlanin kanska skuldi fingið ein eitt sindur annan ham – serliga um tú sært hvussu, tú soleiðis kanst fáa væl meira burturúr stóru íløguni hjá tær!

Eg ynski tær alla góða eydnu við at altjóðagera Føroyar.

Blíðar heilsur

*elinhein@mail.dk*

# Økismenning í Suðuroy

**HERGEIR NIELSEN**
Løgtingsmaður



Fyri einum ári síðan sendu kommunurnar í Suðuroynni eitt uppskot til landsstýrið um at vera við í einari ætlan, og um, at landskassin lat somu upphædd, sum kommunurnar lótu til eina verkætlan átøkari Eyafjarðaætlanini í Íslandi.

Svar kom tíverri einki aftur úr landsstýrinum.

Umvegis løgtingið hava vit tí roynt at fáa gongd á hetta mál aftur, og vónandi fáa vit undirtøku fyri tí.

Fortreytin fyri at menning kundi taka seg upp í Suðuroynni var, at undirstøðukervið varð bygt út, soleiðis at vinnulívið í oynni fekk so góðar sømdir sum gjørligt.

Undanfarna samgonga tók hesa avbjóðing á seg og setti fleiri størri íløguætlanir út í kortið.

Fleiri hundrað mió.kr. stór ætlan varð løgd í ferju, ferjuhavn, djúphavn, skúla og tunnil, og var tað mesta komið undir land, áðrenn samgongan legði frá sær, meðan Hovstunnilin neyvan verður liðugur fyrrenn um ein tvey ár.

Sitandi samgonga kom fyri einum ári síðan við eini Suðuroyarætlan.

Hon hevur tíverri slept bæði Hvalbiar og Fámjinstunnlinum, men kortini ásannað, at støðan í oynni var vorðin so mikið hættislig, at politisk stig máttu takast til tess at stuðla eini tilgongd, ið hevði støðug arbeiðspláss í oynni við sær.

Tíverri segði løgmansrøðan 2005 eitt hálvt ár seinni als einki um hesa ætlan, og ein eitt ára gomul felags umsókn frá kommununum í Suðuroynni til Føroya Landsstýri um fíggjarligan stuðul til eina felags menningarætlan er tíverri ikki svarað enn.

Tað vóru teir báðir, Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss, sum komu við einum hugskoti um at gera eitt átak við fyrimynd í Eyafjarðaravtaluni, sum varð gjørd fyri ein part av Norðurlandinum í Íslandi, og sum kommunurnar tóku til sín.

Í Íslandi eru tað Vinnumálaráðið, Akureyrar Kommuna, Eyafjarða Íðnaðarmenningarfelag, Bygdastofnun, Hægri háskúlin í Akureyri, Íðnaðarmenningarstovnurin, Eyafjarðar Samstarvsfelag, Norðurlands Búskaparvirksemisstovan, fakfeløg í økinum og Útflutningsráð Íslands, sum eru gingin saman um eina avtalu fyri 4 ár.

Fíggingarmynstrið í Íslandi er í høvuðsheitum, at landið rindar góða helvt, meðan kommunusamtak, vinnusamtak og onnur frá Eyafjarðarleiðini lata rest.

Endamálið er fleirtáttað, men kortini samfelt.

Suðuroyarøkið skal aftur gerast:
ein áhugaverdur búsetingarvalkostur til høvuðsstaðarøkið,
íbúgvatalið skal fáast at vaksa aftur,
kappingarførið skal betrast,
vøkstur skal fáast aftur í búskapin,
arbeiðsmegin skal mennast,
virki og størv í kappingargreinum skal økjast,
dentur skal leggjast á altjóða verkætlanir,
útlendskar íløgur og vitan skulu fáast til økið.

Málið hevur fingið fyrstu viðger á tingi og liggur nú í fíggjarnevndini.

Skotið er upp, at landsstýrið og kommunurnar í Suðuroynni samstarva um ætlanina, og at landskassin fíggjar sama part, sum kommunurnar fyri einum ári síðan hava játtað til hesa ætlan.

# Argjamenn vunnu

**Á einum hátíðarhaldi, sum varð hildið Margarinfabrikkini hóskvøldið, vóru vinnararnir av lýsingarkappingini í Agurk funnir. Vinnarin var filmurin "Nýtið hjálm hvørjaferð!" hjá Jóhannus Elias o.ø.**

AGURK
*tíðindaskriv*

Um filmin, segði Mikkjal Helmsdal –vegna dómararnar – at

"Dómsnevndin letur fyrstu virðisløn til ein film, sum eins og filmurin, ið vann aðru virðisløn, er væl gjørdur og væl gjøgnumarbeiddur. Filmsfólkini hava stýr á søgu, leikstjórn og klipping. Filmurin hevur eitt drive og ein ráan humor, sum rakar málbólkin væl. Hóast humorin, so trúgva dómararnir, at álvarin í boðskapinum eisini kemur fram, serliga tá ein sær lýsingina fleiri ferðir. Tann forvreingjaða røddin í endanum, oyðileggur eitt sindur av stílinum og heildarinntrykkinum, men ikki nóg mikið til, at dómsnevndin slepti metingini um, at sum heild var besti lýsingarfilmurin í hesi kappingini: Filmurin "nýtið hjálm hvørjaferð!"

Høvuðsvinningurin var ein stór telda at klippa film við. Jón Kragesteen, stjóri í Ferðslutrygd, handaði glaðu vinnarunum gávubrævið við telduni.

Annaðplássið fingu John Ivar & Co. Samamanning sum vann stuttfilmakappingina í heyst. Hesir høvdu latið heilar fimm lýsingar inn, so tað var væntandi at onkur lýsing kom í finaluna. Lýsingin sum fekk annað plássið var lýsingin "Á sjúkrahúsinum" Um filmin søgdu dómararnir millum annað " Filmurin sigur eina einfalda og álvarsliga søgu, sum verður stramt og væl fortald. Sjónleikararnir verða brúktir á ein hátt, sum ger søguna 100% trúverduga. Boðskapurin er greiður. Lýsingin hevur eisini eitt feminint kenslusemi, sum hinar lýsingarnar sakna.

Triðaplássið fór, eitt sindur yvirraskandi, inn á Strendur til Stranda Skúla og Poul Arna Klein fyri lýsingina "Heldur hjálm enn gravarsálm." Um lýsingina søgdu dómararnir m.a.: Hugskotið við hjálmunum, sum sita á høvdinum alla tíð og allastaðni, eisini við morgunmatarborðið, er so mikið gott, at dómsnevndin hevur sæð burtur frá teknisku veikleikunum.

Annað og triðaplássið fingu hjálmar til øll á framleiðsluliðnum.

Afturat hesum vórðu tveir aðrir prísir latnir.

Áskoðaraprísurin fór til Bjarna Jøkladal og Ragnar Mouritsen – ella handicap films – fyri film nummar 14. Hesir báðir vóru greiðir áskoðaravinnarar, tí teir høvdu bæði 1 pláss og 2 pláss hjá áskoðarunum.

Og í Margarinfabrikkini var teirra filmur eisini tann ið fekk tað størsta klappið.

Serprísurin – sum er ein prísur Jan og Jákup lata – fór til Brian Sjúrðarson og Tóra S. Joensen fyri lýsingina "Spæl ikki". Lýsingin er einkul men byggir á dupulttýdningin í orðinum spæl. Tað er eitt spæl vit síggja og tað kann vera eitt spæl at koyra í ferðsluni.

Bæði áskoðaravinnararnir og serprísavinnararnir fingu 3 dvd filmar við oscarvinnara.

Tilber at síggja allar lýsingarnar á heimasíðuni hjá Agurk www.agurk.fo